COVID-19 | CORONA

# KAFFISTEÐGIR, KANTINUR
# OG ANNAÐ

Mælt verður til, at fólk í minst møguligan mun savnast í bólkum. Jú færri tess betri – í mesta lagi 10 fólk.

Haldið hóskandi frástøðu (2 metrar) millum starvsfólkini, tí covid-19 (corona) smittar skjótt og lætt.

Minst til handreinføri- hav hondspritt tøkt, soleiðis at starvsfólk kunnu spritta hendurnar áðrenn og aftaná tey fara í kaffistovur, kantinur og onnur felagsøkir.

Mælt verður frá at hava sjálvtøkuborð ella líknandi. Um tað er møguligt, lat so starvsfólkini í kantinuni handfara og flýggja út matin. Skift borðbúnaðin ofta – t.d. 10. hvønn minutt

Vaska kaffistovur, kantinur og felagsøkir dagliga – serliga yvirflatur, ið kunnu virka smittuspjaðandi – t.d. borð, stólar, hurðar og trappugelendara – sí leiðbeining um reinføri á arbeiðsplássum.

Skipað so fyri at fólk sleppa undan at trysta á somu støð, tá tey fáa sær kaffi ella vatn. Hesi felags kontaktstøðu kunnu gerast smittuspjaðarar.

Tilmæli um í mesta lagi 10 fólk eigur helst at vera fylt. Er ikki møguligt at fylgja tilmælinum um, at í mesta lagi 10 fólk eru saman í senn (t.d. á flakavirkjum), er serliga umráðandi at hava serlig fyrilit og fyrivarni – m.a. at økja enn meira um reingerð av felagsøkjum, og at tryggja at fólk bert savnast í smærri bólkum.

Starvsfólk hava altíð eina skyldu til at virða og fylgja fyribyrgjandi átøkum, sum ein arbeiðsgevari setur í verk.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið
FAROESE WORK ENVIRONMENT AND FIRE SAFETY AUTHORITY

TILMÆLI UM SKIPAN OG ATFERÐ Á
**ARBEIÐSPLÁSSINUM**

**Les meiri á www.corona.fo og www.arb.fo.**